# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sendistova og samstarv

Fyri tveimum døgum síðani - tann 15. september - vant løgmaður Merkið á stong í Reykjavík, og læt nýggju føroysku sendistovuna varð upp. Hetta er ein stór og gleðilig hending. Íslendingar og føroyingar eru næstu grannar, og vit eru knýtt hvør at øðrum við gomulm søguligum bondum. Tað er tí sjálvsagt, at vit skulu hava sendistovu í Íslandi, og ein kann bert undrast yvir, at hetta ikki er gjørt fyri langari tíð síðani. Hetta so mikið meira sum, at vit einaferð hava havt sendistovu í Íslandi áður nevniliga undir øðrum heimsbardaga, tá mentamaðurin Hans Dalsgaard var føroyskur sendimaður í Reykjavík. Av einhvørji orsøk varð henda sendistova stongd í 1945, og tað skuldi skuldu sostatt ganga 62 ár, til vit fingu tikið okkum saman at opna nýggja sendistovu í okkara næsta grannalandi. Hetta er ein stór hending, sum flestallir føroyingar ivaleyst fegnast um.

Hesi seinastu árini er samstarvið millum brøðratjóðirnar nógv vaksið. Formliga er politiska samstarvið skipað við Hoyvíkssáttmálanum, sum staðfestir tey fýra frælsini. Hetta merkir, at kapitalur, vørur, tænastur og arbeiðsmegi hava frítt at fara landanna millum. Í roynd og veru merkir hetta, at Føroyar og Ísland eru eitt búskaparigt øki. Sum flestum kunnugt eru undantøk, og tað eru tey, sum halda, at hesi undantøk gagna frændum fyri vestan hav meira, enn tey gagna okkum. Er hetta so, ja, so er einki at gera uttan at lurta eftir nýggju føroysku sendikonuni, sum herfyri gjørdi vart við, at tað, sum ein er misnøgdur við í sáttmálanum, tað mugu vit royna at fáa broytt. Hetta er púra rætt. Tað ber ikki til bara at finnast at. Tey vinnulívsfólk og teir politikarar, ið eru misnøgd við Hoyvíkssáttmálan eiga at koma fram og vísa á brekini. Undantøk eru sjáldan av tí góða, og eiga hesi at verða tikin úr sáttmálanum skjótast.

Vit fegnast og vænta okkum nógv av nýggju sendistovuni. Vit hava nógv at samstarva við frændatjóðina um á at kalla øllum økjum: umhvørvi, orku, vinnu, gransking, útbúgving og mentan. Tað liggur ein stór ábyrgd á sendikonuni í Reykjavík at fáa gongd á hetta samstarv. Men her liggur eisini ein stór avbjóðing serstakliga hjá føroyskum vinnulívi, ið hevur nógv at læra av íslendingum serstakliga, tá um altjóða leikpallin ræður. Tað er langt síðan íslendingar fóru at gera sær dælt av globaliseringini. Vit síggja framvegis illa nokk fram um nøsina. Men her hava vit so við sendistovuni fingið eitt gylt høvi at sleppa upp í altjóða dansin um globaliseringina. Tá hetta er sagt, eigur eisini at nevnast, at frændur okkara ivleyst eisini kunnu læra nakað av okkum. Vit hava nógv at geva Íslandi so væl sum heiminum ølloum. Vit ynskja tillukku og góðan byr.

**Sosialurin**

# Uppskot um at hækka skattin

**JÓGVAN SUNDSTEIN**



Síggi í fjølmiðlunum, at Tjóðveldisflokkurin (nú Tjóðveldi) hevur lagt fram lógaruppskot um at hækka skattin hjá fólki. Eg sigi við vilja at hækka skattin, tí galdandi lóg ásetur ein skattastiga, sum fyri 2008 krevur lægri skatt, enn tann, sum Tjóðveldið nú skjýtur upp. Grundgevingarnar hjá Tjóðveldinum fyri uppskotinum eru:

a) at taka eitt sindur av ferðini av einum búskapi, ið er á veg móti álvarsligum trupulleikum
b) at spara landskassanum 72 mió. kr. og kommununum 13 mió. árliga
c) at minka eitt sindur um sosialu gjónna
d) at bøta um grundarlagið fyri haldgóðum vælferðartænastum

**Viðvíkjand a).** Tað er helst rætt, at ein skattahækking minkar um ferðina á búskapinum. Tað hava vit sæð í ólukkumáta fyrr. Tað er rættiliga upplagt, at tann tørvur, sum í løtuni er á arbeiðsmegi kemur at standa við og versna. Serliga minkar hugurin hjá fólki við arbeiðsmøguleikum at taka eina hond eyka í, tí skatturin fer við ov stórum parti av meirinntøkuni. Tann skipaða skattalækkingin, sum hevur verið framd seinru árini í Føroyum hevur havt við sær búskaparliga framgongd og meirinntøku til bæði arbeiðstakarnar, vinnuvirki, landskassa og kommunurnar. Hendan gongdin fer at steðga, og tí kemur búskapurin í størri trupulleika av framlagda uppskotinum.

**Viðvíkjandi b).** Skattahækkingin fer ikki at spara landskassanum 72 mió. og kommununum 13 mió. Um teoriurin hjá Tjóðveldinum passaði høvdu landið og kommunurnar fingið 85 mió. afturat til nýtslu (neyvan sparing). Men nú heldur teoriurin ikki, tí inntøkurnar vera minni, bæði hjá fólki og hjá landinum og kommununum.

**Viðvíkjandi c).** Sosiala gjógvin minkar ikki við at krevja meiri inn í skatti frá fólki. Tvørtur í móti kann væntast, at fleiri fólk fáa ein sosialan tørv, sum tey ikki høvdu havt, um tey høvdu samanlagt tær 85 mió. tøkar, sum galdandi lóg roknar teimum til.

**Viðvíkjandi d).** Hetta er vanliga grundgevingin, sum eisini verður brúkt sum herróp í Danmark, nevniliga: Skattalætta ella vælferð. Veruleikin er tvørturímóti. Við einum vælskipaðum skattapolitikki við lágum skatti, og um neyðugt skattalættum, økist vælferðin. Partvís tí, at sosiali tørvurin verður minni, og tí at lægri skattur nærmast sum ein náttúrulóg eisini gevur størri inntøkur til almennu kassarnar. Tí eitur tað ikki: Skattalætti ella vælferð, men skattalætti og vælferð.

Eg síggi eisini, at Tjóðveldið í løgtingsmálinum setur upp á einum skema, at teirra uppskot fær fíggjarligar og búskaparligar avleiðingar fyri bæði lands- og kommunalar myndugleikar, fyri pláss í landinum, fyri ávísar samfelagsbólkar og fyri vinnuna. Tað er rætt, at tað kann skrivast ja út fyri øllum hesum. Men í øllum førunum verða hesar avleiðingarnar negativar, uttan undantak.

Eg síggi eisini í referati frá tingviðgerðini av málinum, at fíggjarmálaráðharrin tekur undir við uppskotinum frá Tjóðveldinum. Hann sigur millum annað, at skattalættin í hesum valskeiði hevur verið 383 mió., móti ætlaðum 250 mió. Tað er júst ávirkanin frá skattalækkingarpolitikkinum, at upphæddirnar eru vorðnar so stórar. Tað er tann positiva ávirkanin, sum ger seg galdandi. Hevði skattalækkingin ikki verið framd, høvdu hesir pengar ikki eksisterað. Men nú eru teir har, og ein størri partur er eisini farin í landskassan og kommunukassarnar, júst takkað veri hesum politikki.

Annars sær út til, at summir politikkarar halda, at fær fólk minni skatt, so fara allir pengarnir út í eyka nýtslu (at skilja sum óneyðuga nýtslu). Tað er ikki givið, at hetta er rætt. Nýtslumynstrið er nógv meira fjølbroytt, og ein partur fer til uppsparing og til dømis keyp av partabrøvum.

Ein áhugaverd útsøgn kom eisini fram undir tingviðgerðini. Tað var Høgni Hoydal, sum helt tað vera forvitnisligt, at ein politiskur fíggjarmálaráðharri úttaði seg fakliga og ikki hugsjónarliga. Hetta fær meg at koma í hug orðini hjá Paulusi, at kunnskapurin blæsur upp, kærleikin byggir upp. Tá ein politikkari bert hevur kunnskapin sum grundstøði, skal hann hava eitt annað arbeiði. Tað eru hugsjónirnar sum fremja framburð. Kunnskapurin er góður at hava sum amboð.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.